Jógvan Thomsen, bygdaráðsformaður í Nólsoy:

# Ágóðarnir ikki býttir javnt

*Tað er ikki altíð so tespiligt hjá teimum ferðandi niðaneftir molanum í Nólsoy á vetrardegi. – Havnin er okkara »koyrivegur« til meginøkið, ið gevur okkum atgongd til restina av samfelagnum, sigur Jógvan Thomsen*



**– Vit hava goldið landsvegagjald til vegirnar á meginøkinum síðan einaferð í sjeytiárunum, hóast vit ongan landsveg hava. Men biðja vit um styrk til okkara »koyriveg«, sum er havnin, ið gevur okkum atgongd til restina av samfelagnum, verða vit ikki hoyrd, sigur Jógvan Thomsen, bygdarráðsformaður í Nólsoy**

*Vilmund Jacobsen*

Verkætlanin, sum hevði gjørt havnina trygga, kostar slakar 6,5 milj. krónur, men líkt er ikki til, at myndugleikarnir vilja hjálpa okkum. Meðan risastórar íløgur eru lagdar aðrastaðni, eisini á smáplássum kring landið, hava vit fingið 2-3 milj. krónur í okkara part síðan 1974, sigur Jógvan Thomsen.

Á fíggjarætlanini hjá Nólsoyar kommunu fyri komandi ár, sum javnvigar við 6,25 milj. krónum, er størsta einstaka upphæddin sett av til havnagerð, nevniliga 2 milj. krónur.

Nólsoyingar hava í mong ár droymt um betri havnaviðurskifti, men higartil er hetta ikki vorðið til meira enn dreymar. Viðurskiftini eru undir alt lágmark, bæði hjá útróðrarvinnuni og samferðsluni, ið er lívæðrin á eini útoyggj, har nógv fólk hvønn dag ferðast til Havnar til arbeiðis og í skúla.

## Verkætlanin kostar 6,5 milj. krónur

Jógvan Thomsen, bygdaráðsformaður, sigur, at longu í 1983 vórðu neyvar kanningar gjørdar av havnaviðurskiftunum í Nólsoy við serligum atliti til trygdina á samferðsluøkinum, ið er tann mest álvarsligi trupulleikin. Tað var Landsverkfrøðingurin, sum bað Dansk Hydraulisk Institut gera hesar kanningar.

– Teir mæltu kommununi til at arbeiða við tí loysnini, sum teir mettu geva besta úrslitið, og tað er hendan loysnin, vit miðja eftir at fremja í verki. Verkætlanin byrgir lágættaralduna úti og loysir teir trupulleikar, ið eru, tá ið nógvur vindur er vestaneftir. Samanumtikið høvdu vit fingið eina trygga og góða havn fyri 6,48 milj. krónur umframt mvg.

Í vár søkti Nólsoyar kommuna myndugleikarnar um stuðul sambært skipanini um bygging av samferðsluhavnum, men haðani er einki ítøkiligt svar komið enn.

– Vit hava tó skilt, at myndugleikarnir ikki eru serliga positivir í hesum sambandi, og tað er hugstoytt – ikki minst, tá ið havt verður í huga, at krøvini til kommununa verða økt alla tíðina, sigur Jógvan Thomsen.

## Havnin er okkara »koyrivegur«

Hann vísir á, at Nólsoyar kommuna hevur goldið millum 1,5 og 2 milj. krónur netto í landsvegagjaldi siðan einaferð í sjeytiárunum, hóast eingin landsvegur er í kommununi.

– Eg haldi, tað er burturvið, at ein útoyggjakommuna, ið hevur tað nóg tungt frammanundan, skal gjalda til vegirnar í meginøkinum. Biðja vit um styrk til okkara »koyriveg«, sum er havnin, ið gevur okkum atgongd til restina av samfelagnum, er ikki líkt til, at nøkur hjálp er at heinta.

Jógvan dugir ongan samanhang at síggja í, hvussu ágóðarnir í landinum verða býttir, men leggur aftrat, at tað man vera tann politiski viljin, sum kemur til sjóndar, tá øll ikki skulu fáa sín part av »køkuni«.

– Hyggja vit eftir, hvussu nógvur peningur er lagdur niður aðrastaðni, tola viðurskiftini ikki nakran samanburð. Vit misunna ongum nakað, men tølini tala fyri seg. Í Hesti búgva 50 fólk; har hava tey eina havn, sum kostar 35-36 milj. krónur. Tað gevur 650.000 krónur fyri hvønn íbúgva. Í okkara føri hava vit fingið 24.000 krónur fyri hvønn íbúgva fyri tær 2-3 milj. krónurnar, sum lagdar vórðu her í 1974! Alt projektið í sambandi við sandoyarleiðina kostar helst einar 500 milj. krónur, og tað gevur einar 340.000 fyri hvønn íbúgva í Sandoynni, sigur bygdaráðsformaðurin, sum staðfestir, at ágóðarnir í samfelagnum ikki verða býttir javnt.

## Einki samsvar

Jógvan er samdur við teimum, sum siga, at Nólsoy er ein náttúruperla. Tað er skjótt at ferðast um fjørðin, og væl dámar ferðafólki at koma út og steðga nakrar tímar.

– Men Strandferðslan setir síni krøv til eitt nú havnaviðurskiftini, og Ferðaráðið eggjar okkum til at stuðla uppundir ferðamannavinnuna við at hava bíðirúm, almenn wc, skelti og onnur viðurskifti, sum gera tað lættari hjá teimum ferðandi í oynni. Vit duga bara ikki at síggja nakað samsvar millum tey krøv og ynskir, ið eru og so tær vantandi sømdir, ið eru frá almennari síðu, sigur bygdaráðsformaðurin, Jógvan Thomsen.








*Soleiðis sær verkætlanin út, sum Dansk Hydraulisk Institut hevur gjørt yvir nýggja havnalagið í Nólsoy. – Her høvdu vit fingið eina trygga og góða havn fyri lutfalsliga fáar miljónir, sigur Jógvan Thomsen, bygdaráðsformaður.*



# Ársins jólabryggj

JÓLABRYGGJ
*Ingrid Bjarnastein*

Sum siður er í Danmark høvdu tey donsku bryggjaríini í november mánaða eina kapping um ársins jólabryggj. Eins og vanligt er, komu limir frá »Selskab for Vestjysk Ølkultur« saman at royndarsmakka og døma jólabryggið.

23. november gjørdu 65 limir frá »Selskab for Vestjysk Ølkultur« eitt smakki pallborð og smakkaðu tey 14 ymisk sløg av donskum jólabryggi og sum nakað heilt nýtt eisini eitt føroyskt slag av jólabryggj – Føroya Bjór Jóla Bryggj.

Royndarsmakkanin var ein blindsmakking, soleiðis at dømingin av jólabrygginum varð so objektiv sum møguligt.

Tað sterka jólabryggið inniheldur sjálvandi mest alkohol, men tað týðandi er, at mest smakkur er í. Tí kom tað kanska ikki heilt óvæntað, at trý sterk jólabryggj myndaðu ársins topp trý.

Jólabryggið hjá Hancock Bryggjarí fekk mest stig, meðan Blålys frá Albanis varð nummar tvey og tað økologiska jólabryggið »JuleRen« frá Thisted Bryghus varð nummar trý.

Eisini fekk jólabryggið frá Føroya Bjór viðurkenning við royndarsmakkanina. Í stigum endaði Føroya Bjór í miðjuni saman við øðrum kendum merkjum sum Tuborg Julebryg, Carls Jul og X-MAS frá Thor.

# Sangmøti við sangkórinum í Siloa

Sangkórið í Siloa plagar í vetrarhálvárinum at hava nøkur sangmøtir ymsastaðni í landinum. Endamálið við hesum møtum er at boða evangeliið - fyrst og fremst við sangi, men eisini við vitnisburði og talu. Tað fyrsta av hesum møtum verður nú sunnukvøldið 9. desember klokkan 18.00 í Siloa í Fuglafirði. Tá fer kórið at syngja ymiskt nýtt tilfar, sum tey hava vant í heyst. Og tá ið nú stundar til jóla, verða sjálvandi eisini nakrir jólasangir á skránni.

**-ib**

# Jólatrø verða tendrað

Nú stundar rættiliga móti jólum. Sjeynda lúkan á jólakalendaranum varð latin upp í dag, og í morgin tá áttanda lúkan stendur fyri skotum, verða jólatrøini í Tórshavnar Kommunu tendrað.

Stóra jólatræið við Tinghúsvøllin varð tendrað seinasta leygardag, meðan jólatrøini á teimum smærru plássunum verða tendrað í morgin.

Klokkan 15.30 verður jólatræið á Argjum tendrað. GHM spælir, og Sverri Steinhólm, prestur og Beate L. Samuelsen tala.

Í Kaldbak tendra tey jólatræið klokkan 16.30. Her talar Bjarni Bæk, dómpróstur og Heðin Mortesen, býráðslimur kemur eisini at siga nøkur orð. Eisini fer GHM at spæla fyri kaldbaksmonnum.

Hvítanesmenn kunnu síggja jólatræið verða tendrað klokkan 17.00. Her fer Havnar Hornorkestur at spæla, Bergur D. Joensen, prestur og Beate L. Samuelsen fara at tala.

Jólatræið í Kollafirði verður tendrað klokkan 18.00. Kristiliga Sangkórið fer at syngja nakrar sangir, og Martin Restorff Jacobsen prestur talar.

Norðadalur hevur eisini eitt jólatræ, og klokkan 18.30 verður tað tendrað. Tey í GHM fáa nógv at gera, tí tey skulu eisini spæla í Norðadali. Bjarni Bæk, dómpróstur og Heðin Mortensen, býráðslimur tala.

**-ib**

# HTV og Lítla Rúm í Margarinfabrikkini

Margarinfabrikkin hevur millum ár og dag hýst nógvum ymsum tiltøkum í hølunum hjá sær. Seinastu tíðina hevur verið vanligt, at hava barnadiskotek og konsertir aðru hvørja viku.

Í kvøld er so aftur ein konsert á skránni. Bólkarnir HTV og Lítla Rúm skulu undirhalda teimum, ið hava hug at leita sær til Margarinfabrikkina í kvøld.

HTV er ein hampuliga nýggjur bólkur. Teir byrjaðu at spæla í mars mánaða í ár, og spæla teir mest rokktónleik. Bólkurin spælir egin løg, sum mest eru um, hvussu keðiligt tað er at vera ein minnilutabólkur í Føroyum.

Lítla Rúm byrjaði sum ein stuttleika bólkur. Teir vóru millum annað at síggja í undanumfarinum til Prix Føroyar í Klaksvík fyrr í vár, men teir sluppu ikki víðari til finaluna.

Tekstirnir hjá ólkinum snúgva seg um alt tað keðiliga, sum fer fram kring landi, sum til dømis hatur, kríggj, dapurskygni – hetta er ein doyvandi mjørkatoka yvir lyndið, siga teir úr Lítla Rúm.

**-ib**

